Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	21. september 2023
Mál nr.:	23/07005
Málsviðgjørt:	BH/OYS
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	22. september 2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul
(Broyting í javning av stuðulsupphæddum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 19 verður orðað soleiðis:

"**§ 19.** Stuðulsupphæddirnar sbrt. §§ 7-12 verða tann 1. januar á hvørjum ári javnaðar.
Stk. 2. Javningarprosentið fyri komandi árið verður útroknað sum miðaltalið av:
1) prosentvísu broytingini í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaða skeiðnum, sum endaði 1. oktober í verandi ári, og
2) prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum fyri mai í verandi ári, í mun til mai árið fyri.

Stk. 3. Er roknaða javningarprosentið hægri enn prosentvísa broytingin í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum, verður javningarprosentið sett til prosentvísu broytingina í lønarkarminum.
Stk. 4. Um prosentvísa broytingin í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum er fyri styttri tíðarskeið enn tólv mánaða skeiðið sbrt. stk. 2, nr. 1, verður hetta tíðarskeiðið nýtt.
Stk. 5. Er roknaða javningarprosentið minni enn null, verður javningarprosentið sett til null.
Stk. 6. Javning eftir hesum ásetingum fer fram fyrstu ferð tann 1. januar 2025, og eftir hetta verður javnað tann 1. januar á hvørjum ári. Javnað verður ikki tann 1. august 2024 eftir áður galdandi reglum."
Stk. 7. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um javningarprosentið og

javnaðu stuðulsupphæddirnar sbrt. §§ 7-12.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Orsøkin til uppskotið er at javnstilla javningina av lestrarstuðlinum við javningina av almannaveitingum, sbrt. løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 145 frá 15. november 2021. Hetta hevur við sær, at javningin av lestrarstuðlinum verður vektað helvt um helvt við lønarvøkstri og prístalsvøkstri árið undan fram til 1. oktober. Er lønarvøksturin lægri enn prístalsvøksturin, verður bert javnað við lønarvøkstrinum. Javningarprosentið og javnaðu stuðulsupphæddirnar verða ásett í reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur.

Eftir galdandi lóggávu verður javningin gjørd við útgangsstøði í prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri undanfarna ár í mun til miðalprístalið fyri árið undan hesum. Tó er eingin javning gjørd, tá prístalið er lækkað, tí man hevur ikki ynskt, at lestrarstuðulsupphæddirnar lækkaðu orsakað av lækking í prístalinum. Hetta er tí eisini ein orsøk til at broyta javningina til at verða við støði í lønarvøkstrinum, tí lønarvøksturin er ongantíð minni enn null.

Lestrarstuðulin er seinast javnaður tann 1. august 2023, tá javningin var 7,7%. Javningarprosentið fyri almannaveitingar í 2023 var harafturímóti 1,25%. Sambært hesum uppskotinum verður lestrarstuðulin javnaður tann 1. januar á hvørjum ári, og eftir sum at tað bert hevði verið eitt hálvt ár til, at lestrarstuðulin aftur skal javnast, verður ongin javning í 2024. Fyrstu ferð, tað verður javnað, aftur verður tann 1. januar 2025, og verður tað tá eftir nýggja leistinum.

1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi lóggávu verður lestrarstuðulsveitingin sbrt. §§ 7-12 í løgtingslógini javnað tann 1. august á hvørjum ári. Javningin verður gjørd við útgangsstøði í prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri undanfarna ár í mun til miðalprístalið fyri árið undan hesum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at javnstilla javningina av lestrarstuðlinum við javningina av almannaveitingum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Nýskipanin hevur við sær, at javningin frameftir verður gjørd við útgangsstøði í miðal av prís- og lønarvøkstri undanfarna árið, og ikki eftir prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri undanfarna ár í mun til miðalprístalið árið undan hesum.

Í fleiri ár hevur upphæddin til lestrarstuðul nærmast staðið í stað, tí sera lítil broyting hevur verið í miðalprístalinum. Okkurt árið er miðalprístalið lækkað, men tá hevur lestrarstuðulin verið óbroyttur, tí hvørja ferð tað er hent, er ein lógarbroyting gjørd til lestrarstuðulslógina, um at stuðulsupphæddirnar ikki verða javnaðar.

Lógaruppskotið hevur við sær, at veitingarnar til lesandi og borgarar, ið fáa almennar veitingar, verða javnaðar eftir sama leisti í framtíðini.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er fyrireikað saman við Undirvísingarstýrinum (Studna), men hevur ikki verið til almenna hoyring. Lógaruppskotið er fyrireikað í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2024, har ein fortreyt er, at javningin av lestrarstuðlinum verður broytt. Lógaruppskotið skal tí verða lagt fram og samtykt í seinasta lagi samstundis sum fíggjarlógaruppskotið. Avgerðin um at fyrireika málið bleiv tikin ov seint til at klára at senda uppskotið til almenna hoyring.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógarbroytingin hevur við sær, at javningin, sum sambært galdandi lóg eigur at verða gjørd av lestrarstuðlinum tann 1. august 2024, ístaðin verður gjørd tann 1. januar 2025, tá hon verður gjørd eftir nýggja leistinum í hesum uppskotinum. Í fíggjarkørmunum fyri 2024 er lestrarstuðulin framskrivaður við einari mettari javning á 3%. Uppskotið hevur tí við sær eina sparing á 3% av lestrarstuðlinum. Lestrarstuðulin er slakar 100 mió. kr., og sparingin í 2024 er sostatt 5/12 partar av 3 mió. kr., sum er umleið 1,2 mió. kr.

Sambært hesum uppskotinum verður ikki javnað aftur fyrr enn tann 1. januar 2025, og verður tað tá eftir nýggja leistinum. Javningarprosentið er enn ókent.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur við sær, at útrokningargrundarlagið fyri at javna lestrarstuðulin verður broytt. Tó verður ikki mett, at broytingin fer at hava nakrar munandi umsitingarligar avleiðingar fyri landið, men at umsitingin av hesum leistinum fer at hava við sær umleið somu umsiting, sum verandi leistur hevur.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri lesandi, við tað, at lestrarstuðulin í framtíðini verður javnaður árliga við miðal prís- og lønarvøkstri undanfarna árið og ikki longur eftir prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri undanfarna ár í mun til miðalprístalið fyri árið undan hesum.

Í talvuni niðanfyri er ein samanbering millum javningarprosentið til lestrarstuðul og almannaveitingar, har lestrarstuðulin er javnaður eftir galdandi leisti.

	2022	2023
Javningarprosent til lestrarstuðul	2,70%	7,70%
Javningarprosent til almannaveitingar	2,05%	1,25%

Tað sæst í talvuni, at javningarprosentið til lestrarstuðulin hevur verið hægri í 2022 og 2023. Javningarprosentið komandi árini er ikki kent, men broytingin hevur við sær, at javningin av lestrarstuðlinum verður lægri orsakað av uppskotinum, men hvussu nógv er ilt at meta um.

Lógarbroytingin hevur eisini ta avleiðing fyri lesandi, at javningin, sum sambært galdandi lóg eigur at verða gjørd av lestrarstuðlinum tann 1. august 2024, ístaðin verður gjørd tann 1. januar 2025, t.v.s. eitt hálvt ár seinni. Tá verður hon gjørd eftir nýggja leistinum í hesum uppskotinum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar, ið eru viðkomandi fyri uppskotið.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, ið eru viðkomandi fyri uppskotið

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld, so sum nýtslugjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur heimild til at áseta nærri reglur um javningarprosent og javnaðu stuðulsupphæddirnar til landsstýrismannin.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
Greinin snýr seg um útrokning av javningarprosentinum. Upphæddirnar sbrt. §§ 7-12 verða javnaðar tann 1. januar á hvørjum ári.

Stk. 2. Mælt verður til at brúka miðal av: 1) prosentvísu broytingini í lønarsáttmálanum hjá Fíggjarmálaráðnum (karmurin), og: 2) prosentvísu broytingini av brúkaraprístalinum hjá Hagstovuni.

Ad.1) Prosentvísa broytingin í lønarsáttmálanum hjá Fíggjarmálaráðnum (karmurin)
Lønarbroytingin er vigað miðal av lønini í almennu lønarsáttmálunum í tólv mánaðskeiðnum fram til 1. oktober samanborið við lønina í undanfarna tólv mánaðaskeið. Lønarbroytingin verður upplýst av Fíggjarmálaráðnum. Prosentvísa broytingin í lønarkarminum í 2022 í mun til 2021 var (sbrt. Fíggjarmálaráðnum) 1,25%. Árið fyri var broytingin 2,05%.

Ad. 2) Prosentvísa broytingin av brúkaraprístalinum hjá Hagstovuni
Tann prosentvísa broytingin av prístalinum, sum verður nýtt í javningini, tekur støði í prístalinum fyri mai í verandi árið, sum Hagstovan kunnger, í mun til prístalið fyri mai árið fyri. Prístalið fyri mai í 2021 var 124,6 og prístalið fyri mai í 2022 var 133,6. Prosentvísa hækkingin mai í 2021 til mai í 2022, var sostatt 7,22%.

Stk. 3. er ein áseting um hámark fyri javningarprosentið. Ásett verður, at javningarprosentið kann ikki verða hægri enn vøksturin í almennu lønunum. Er roknaða javningarprosentið hægri enn almenni lønarvøksturin, verður javningin sett ájavnt við almenna lønarvøksturin.

Í døminum í stk. 2 omanfyri sæst, at javningarprosentið frá mai í 2021 til mai í 2022 er hægri enn vøksturin í almennu lønunum í 2022. Javningin verður tí sett ájavnt við almenna lønarvøksturin.

Hevði javningarprosentið t.d. verið 2% og almenni lønarvøksturin 2,5%, hevði talan verið um miðal av hesum báðum, tí javningarprosentið er lægri enn almenni lønarvøksturin. Javningarprosentið hevði í hesum døminum verið 2,25%.

Stk. 4. verður brúkt í teimum førum, tá lønarhækkingarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum ikki hækka tann 1. oktober. Vanliga hækka lønirnar 1. oktober og aftur 1. oktober árið eftir. Tá er tað høvuðsreglan í § 1, stk. 2, nr. 1, sum er galdandi. Tá lønirnar hækka t.d. frá 1. januar, er tað prosentvísa hækkingin í januar, sum verður brúkt. Prosentvísa hækkingin skal tá ikki umroknast til at galda frá 1. oktober.

Stk. 5. er ein áseting um minstamark á javningarprosentinum. Ásett verður, at javningarprosentið kann ikki vera negativt. Er roknaða javningarprosentið negativt, verður javningin sett til null.

Stk. 6. er áseting um, at javning eftir § 19 fer fram fyrstu ferð tann 1. januar 2025, og at tað síðani verður javnað tann 1. januar á hvørjum ári. Ongin javning verður tann 1. august 2024 eftir áður galdandi reglum.

Stk. 7. er áseting um, at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um javningarprosentið og javnaðu stuðulsupphæddirnar sambært lógini hvørt ár tann 1. januar, fyrstu ferð tann 1. januar 2025.

Til § 2
Gildiskoma er sett til dagin eftir, at lógin er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 28. september 2023

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur